gult cyan magenta svart

Brak og brotnar fløskur

Leygarkvøldið var síðsta undanumfarið í Prix Føroyar kappingini 2001. Vinnarin gjørdist Tangz, og á næsta plássi var bólkurin 200. Nú eru so allir átta finalistarnir funnir

PRIX-FØROYAR
Torkil V. Rasmussen
myndir: Jens Kristian Vang

Miðvágur: Hóast kavaódn og jarðrok funnu nógv fólk til bygdahúsið í Miðvági, har tann sekstanda undankappingin, síðan Prix Føroyar tiltakið byrjaði í 1995, varð hildin.

Spenningurin var ósteðgiligur, tí teir flestu bólkarnir vóru sera góðir og dugdu væl at spæla og framføra.

-Eg haldi enn einaferð at Prix Føroyar tiltakið var væleydnað, men trupulleikin er mest tann, at fólk eru ov drukkin, tá ið tey koma til tiltakið, og tey gera ikki sum reglarnar siga. Tey taka glasfløskur inn við í hølið, og tað kann gerast vandamikið, um onkur dettur, sigur Fróði T. Vestergaard samskipari á tiltakinum.

Framgongd

Sosialurin hevði eisini eina samrøðu við ein av okkara garvaðu tónleikarum, og hetta var eingin minni enn Sámal Ravnsfjall.

Hvat dámar tær tiltakið?

Jú, mær dámar væl.

Hvat heldur tú um bólkarnar?

Teir eru góðir, men eitt sindur rótutir í ljóðinum.

Heldur tú at føroyskur tónleikur kann samanberast við útlendskan?

Eg vil siga, at hann er í góðari menning.

Um man hevði teir røttu menninar at fáa tónleikin til at sláa ígjøggnum uttanlands, heldur tú so at tað hevði borið til?

Jú, avgjørt.

Vit eita Yst, og vit spæla fyrst!

Fyrsti bólkur á palli var bólkurin Yst. Tey seks, ið mannað bólkin, siga, at teirra tónleikaslag eitur dradl, tí tey spæla disco-rock - annars deiliga líka til.

Bólkurin byrjaði um somu tíð sum ársins DJ 2000 var, siga tónleikarnir í bólkinum.

-Tað handlar um at síggja gott út, meðan man ger tað, leggur bólkurin aftrat.

Yst fór á pall, og við einum braki rockaði og rappaði Yst fyrst, og tað jammaði nakað so øðiliga væl.

Væl hoyrdist eisini, at hesin bólkurin fyrr hevur nomið við ein av okkara stóru rock-rap bólkum, nevniliga Prix Føroyar99 finalistarnir MC Hár.

Maningin úr Yst var ótrúliga væl samanspæld, og sangarin dugdi væl at fáa áhoyrarnir við. Hetta gjørdi hann við at flippa út á tí roykríka heita pallinum.

Partar av fólkinum stóðu og hoppaðu í ring, meðan tann brakandi góði techno-ljómurin leikaði í teimum trettan hátalarunum.

– Vakurleiki, tað er tit, rópti tann filosofilesandi sangarin, Niels Uni Dam, út til fólkið á staðnum.

Tónleikurin ýddi í breakum og temposhiftum.

Næstan øll manningin í Yst hevur fyrr leikt í MC-HÁR, uttan tey bæði Anna Kristin Bæk, sum flest av okkum kenna úr sangleikinum Skeyk, og Eyðfinn Drewsen, sum nógv av teimum ungu kenna frá Ársisns DJ kappingum.

Liverpool FC leingi livi

Næstur at stíða á heita pallin í framanfyri skríggjandi áhoyrarum var vágabólkurin Masha, ið var skrúvaður saman við fýra liverpoolarum.

Bólkurin varð stovnaður beint undan Prix Føroyar kappingini 2001, og allir hava leikt í øðrum bólkum fyrr.

Teir tríggir, Birgir Joensen, Hans Ravnsfjall og Jógvan Pauli Joensen, hava spælt í Prix Føroyar 99 undankappingini við bólkinum RUSK, men Jógvan Pauli Joensen hevur eisini spælt við í Bimbs, sum hevur verið finalistur í Prix Føroyum fyrr. Tann síðsti tónleikarin, Tummas Gudmundsen, spældi við í finaluni í 1997 við bólkinum Arrestment.

Stílurin hjá bólkinum var heldur friðarligur og reinur við akkustiskum guitartónum. Knappliga bleiv stilt, og ein lumskur ljómur legði seg út í hølið, úr ljóminum komu ymsar røddir, og tað riggaði knasandi væl, og brádliga kom spanskur guitartónleikur við rock, pop of rap tónleiki, um man so má siga – tað setti rættuliga gongd í tónleik teirra.

Masha fekk fólkið til at rópa umaftur, og tað kann man siga er gott tekin um, at teir leiktu væl. Stutt sagt - ein nýggjur heilt góður rock bólkur.

Gerist frelst, tí tað er ein dómadagur!

Christian extremism er orðið fyri henda sera áhugaverda havnabólk, sum varð stovnaður í 1997. Bólkurin kallast Legacy.

Bólkurin hevur verið á ymsum fløgum, eitt nú høvdu teir eitt lag á fløguni »Ung um aldamóti«, men sigast kann, at bólkurin hevur rættuliga skift stíl. Tá spældu teir friðarliga akkustiskan tónleik, men nú kann ein kalla tað harðan rock, men bólkurin dámar helst betri heitið gospel rock:

-Ein gamal boðskapur við nýggjum búna, tí alt snýr seg um umvending. Vit ynskja at øll skulu taka Kristus til harra.

– Tað var einaferð eitt stað í Miðeystri, har nógvur turkur var, og vatnið, sum har var, var skitið, og fólk doyðu, tá ið tey drukku tað. Men so kom ein maður og bað tey um at kóka tað, tí so var tað ikki vandamikið longur, og tað smakkaði nógv betur enn tað skitna, segði Dánjal Petersen sangari í Legacy.

Bólkurin fór á pallin klokkan 22.22. Legacy spældi øðiliga væl, og tordu ikki minst væl at upptraðka, og Dánjal Petersen fekk fólkið sera væl við. Við tónleiki teirra og Dánjal'sa hátti at sjarmera, gjørdi tað, at hann varð kallaður Charmy Boy.

Legacy vísti væl í verki, at tað sum I Am søgdu var satt – nevniliga at andaligur tónleikur ikki noyðist at vera keðiligur.

Eisini setti Dánjal fólkinum spurningin, um tey vóru við upp á Vágatunnilin, og fjøldin skrálaði ja! Tað má gera vinnumálaráðharra okkara, Bjarna Djurholm, enn tryggari í hesi avgerð.



Fullveldi fyri Føroya fólk!

Havnabólkurin 200 við kendum nøvnum so sum Niels Arge Galan, sum spældi við finalubólkinum Mold í Prix Føroyum 95, og Michael Blak úr núverandi finalubólkinum Clickhaze.

gult cyan magenta svart

Tað er greitt at Michael skal spæla við tveimum bólkum í finaluni, og Niels í einum, og tað er við hesum bólki.

Við kavaódn uttanfyri stóð Niels Arge Galan við hanareiki og sólbrillum innanfyri og rockaði. Rockurin hjá teimum var hampuliga skjótur rockur, við góðum temposkiftum og pausum.

Víst er, at bólkurin treivst øðiliga væl við at framføra á pallinum. Ljósini bleiktraðu í sama títtleika sum tónleikurin hjá bólkinum var í, og ølið, ið tveitt varð í luftina, matchaði bara fínt, tá í tey litfagru ljósini skygdu í dropunum.

Bólkurin dámdi eisini væl at provokera ymsar politikarar við niðurgerandi sangum móti forsætismálaráðharranum Poul Nyrup Rasmussen, javnaðarformanninum Jóannes Eidesgaard, sambandsformanninum Edmund Joensen og fíggjarmálaráðharra okkara Karsten Hansen. Eitt lag, ið teir spældu, høvdu teir givið heiti Skitni Karsten.

Bólkurin fór av pallinum við stíli, tí síðsta lag teirra var Vit eru 200!

Frekt og gott

Tá ið bólkurin MAS steig á pallin og byrjaði teirra framúr góða tónleik, var einki annað at gera enn at opna munnin og spenna eyguni og siga WOW! Ein frálíka góð jammy byrjan við modernaðum jazz keyboard spæli frá Bárði Johannesen.

Spurningurin er, hvar hesir fimm góðu tónleikararnir og studentarnir hava fingið navnið MAS frá? Kundi tað verið frá rekti í Hoydølum?

Áhoyrarnir tóku sera væl ímóti teimum og teirra serliga góða stíli, sum var ein blanding av rocki og nýmótans jazzi.

MAS vóru sera væl samanspældur, og teir vístu rættiligt sjálvsálit og dirvi. Bólkurin var heilt klárt ein av favorittunum.

-Hetta er ikki ein bólkur, ið skjótt verður lagdur í gloymibókina, søgdu nakrir av teimum villu áhoyrarunum.

Heja Þona

Tá ið undanumfarið í Miðvági var komi ein bólk longri enn í helvt. Fóru teir sjey mennirnir frá miðstaðarøkinum, ið mannað bólkin déjà vu á pallin at royna seg, við tí detaljeraða væl gjøgnumførda rockinum hjá sær, sum teir sjálvir kallaðu tónleik teirra.

Déjà vu byrjaði sera friðarliga og tendrarnir vóru á hægsta lofti. Bólkurin var eisini væl samanspældur, men kanska ikki so lívligur sum teir, ið høvdu leikt áðrenn, hetta kann sigast, tí hýrurin hjá fólkinum var lækkaður eitt sindur, ella var tað tí, tey vóru so troytt aftaná tey høvdu leikað í aftaná framførsluna hjá MAS?

Rockurin, ið bólkurin spældi var góður, og tað klangaði bara heilt væl. Serliga tá ið teir koyrdu eitt sindur av rappi í, sum hóskaði væl við trummu og bassrytmu aftanfyri.

Lagið A long way to Friday var øðiliga pent og melodiskt, men tað var ikki júst tað, sum fólkið hoppaði mest til.

Aftaná framførsluna var onkur av tónleikarunum í bólkinum ikki serliga væl nøgdir við framførsluna á pallinum.

Kristiligur kjálkadansur

Sjeyndi bólkur var helst tann yngsti av teimum tiggju bólkunum, sum tóku lut í tiltakinum. Heitið hevur bólkurin møguliga eftir lagnum hjá Crash Test Dummies, nevniliga lagið mmm mmm mmm mmm, tí hesin ungi bólkurin æt M.M.M.

Hetta var tann næsti andaligi bólkurin, sum var við í Miðvági. Sprundini Alice Simonsen og Torert Davidsen sungu væl, at nakrir áhoyrarar løgdu út í dans.

Sosialurin spurdi, hví stemningurin enn ikki var so góður, og tey spurdu søgdu, at tað stilla hjá Déjà Vu hevði eina ávirkan á fólkið, sum eisini skuldi lurta eftir M.M.M.

M.M.M. vóru ikki líka væl samanspældir, sum teir flestu av teimum bólkunum, ið høvdu leikt áðrenn, m.a. tí at hvør einstaklingur í bólkinum stóð bert og passaði sítt, og tað hevði ikki eina so góða ávirkan á framførsluna, sum annars telur nógv í Prix Føroyar kappingini.

Ahou- Alt Hevur Okkara Undran

Við royki og bláum ljóskasti og spældi triðsíðsti bólkurin Ahou við Olgu Joensen, sum flestu ungu havnadreingir kenna úr Skálki í SMS. Hon stóð við sangrøðilin. Olga sang væl, segði onkur av dómarunum aftaná Prixið.

Áhoyrarnir veitraðu við armunum í luftini, og summi høvdu tendrarnir uppi. Tónleikastílurin hjá Ahou var heldur friðarligur rockur, sum Olga og hini í bólkinum dugdu væl at handfara, og tað var til gagns fyri teir dreingir, sum júst høvdu fingið sær onkra fitta vágagellu.

Tann eini guitarleikarin John Johansen og bassspælarin Uni S. Joensen vóru eisini í sólbrillum innanfyri veggirnir í bygdahúsinum í Miðvági, tí uttanfyri hevði tað ikki rigga serliga væl.

Alt varð tangza niður

Vinnarabólkurin Tangz vísti, at hetta vóru menn, sum ikki eru ókendir á palli. Bólkurin var í Prix Føroyar finaluni99, og leygarkvøldið vórðu teir settir at spæla næstsíðst.

Vit kenna m.a. Hall Johannesen og Rók J. Jakobsen úr gamla bólkinum Lokum, sum sang um apuna Charlie.

Við dirvi og sjálváliti fór hesin megnar bólkurin á pallin við klæðningi og slipsi. Áhoyrarnir høvdu ikki skríggja so nógv leygarkvøldið, sum tá Tangz kom á heita pallin.

Upptraðkanin hjá Tangz var eksemplarisk uppá ein vinnarabólk, sum bara dugdi síni ting, og vísti tað í verki.

Tangz var heilt klárt tann kendasti bólkurin í Miðvági. Farnir av palli geylaði fólkið TANGZ ! TANGZ ! TANGZ !

Við sveitta og nervum kom Tangz inn í skiftingarrúmið, og teir fimm sum manna bólkin Hallur, Rókur, Dánjal, Halgir og Rói vóru sera væl nøgdir við framførsluna. Rókur helt at teir aldrin høvdu spælt fyri so góðum fólkið fyrr, og allir vóru sera væl nøgdir við alt tiltakið.

Kom og berjist!

Síðsti bólkurin var havnabólkurin, sum hevði ein tónleikara úr Funningsfirði, nevniliga trummuspælarin Magnus Hansen. Onkur kennir bólkin Happy frá Pop Top konsertini í 1997, og tá vann Flux, sum nú er finalistur í Prix Føroyum01.

Vit spæla fyri sex, pengar og árligari haruskjóting, søgdu teir sjey um Happy. Tvey kend nøvn vóru við í bólkinum Happy, og tey vóru Niklas Thorsteinson, sum stóð við ljómborið, og hann var eisini sangari í gamla bólkinum Mold, og Rasmus Rasmussen, ið var ljóðmaður, kenna næstan øll frá rockstovuni í ÚF.

Við byrjanina á framførsluni, helt sangarin Ári Rouch eitt ultraviolet rør ímóti áhoyrarunum, og teir vóru væl fagnaður av fólki.

Happy spældi tungan rock, sum gjørdi, at tey sum dáma tann stílin komu heilt í ekstasu, meðan hini bara stóðu og hugdu. Ein betri lýsing av tónleikastílinum hjá Happy, er tað sum tey tilkomnu kallað púra ørt.

Tiltakið í Miðvági endaði við at teir báðir finalu bólkarnir Tangz og 200 fóru upp ein bólkur í senn og spældu eitt lag í part. 200 spældi eitt lag sum teir kallað Hashsigarett, og Tangz spældi Livin' on a Prayer hjá Bon Jovi, men Tangz kundi ikki halda sær við bara at spæla eitt lag, so teir spældu til síðst Thunderstruck hjá AC/DC.

Næsta Prix Føroyar tiltakið verður finalan í norðurlandahúsinum tann 21 april.